# Nýggjar avbjóðingar í Bosnia

**4. apríl fer føroyska kvinnulandsliðið til Bosnia, har Challenge Trophy-kappingin er á skránni. Føroyar eru einasta landið í kappingini, sum eisini var við í Italia fyri tveimum árum síðani**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Flemming Raben, sum er annar av venjarunum hjá kvinnulandsliðnum, situr her saman við Ásu á Neystabø og Unn Kragesteen. Báðar eru tær nýggjar á landsliðnum, sum um góðan mánað setir kós móti Sarajevo*

*Mynd: Álvur*

Fríggjadagin 31. mars fer føroyska kvinnulandsliðið við flogfarinum hjá Atlantic til Danmarkar. Ørindini har eru ein stutt venjingarlega, áðrenn kósin tann 4. apríl verður sett móti Sarajevo, har Challenge Trophy í ár verður hildin.

### Spildurnýggjar avbjóðinar

Verður hugt at luttakaralistanum, so sæst, at Føroyar eru einasta landið í kappingini, sum eisini var við seinast, og tað kundi bent á, at Føroyar hesa ferð skulu roknast millum avgjørdu favorittarnar, eftir at talan fyri tveimum árum síðani gjørdist um silvurmerki.

Men tað er samstundis lítið at ivast í, at talan verður um harða mótstøðu. Vertstjóðin tók seinast lut í Challenge Trophy fyri seks árum síðani, og ta ferðina vunnu tær kappingina. Hartil kann eisini roknast við, at Letland hevur eitt gott lið, meðan flestu av hinum londunum mugu roknast sum hampuliga óvissir faktorar.

Ella sum annar av landsliðsvenjarunum, Flemming Raben, segði, tá tíðindafundur varð hildin í Sunset Boulevard í SMS í morgun.

– Spyrt tú meg, hvørjum londum vit helst vilja møta, er svarið Ongland og Cypros. Hini londini kenni eg púrt einki til!

### Spennandi hópur

Flemming legði annars dent á, at hann helt talan vera um ein sera spennandi hóp, sum nú fer avstað. Í mun til hópin, sum fyri tveimum árum síðani vann silvur í Mezzocorona, er talan um sjey spildurnýggjar spælarar. Og hetta er nakað, sum undirstrikar ættarliðsskiftið í hópinum, helt Flemming.

– Á einum landsliði vil talan altíð vera um nakrar náttúrligar útskiftingar, men tað kann væl vera, at hópurin hesaferð er nakað yngri enn tann, sum var við seinast. Vit hava tó havt onkrar skaðar (Gunnleyg Berg, Lív Sørensen og Nikolina Eyðbjørnsdóttir), eins og nakrir spælarar hava givið avboð.

– Men eg haldi eisini, at hetta sigur nakað um møguleikarnar, sum eru í føroyskum hondbólti. Vit vóru í fjør við U-liðunum í Nøvling Cup í Aalborg, og góðu avrikini frá teirri ferðini merkja eisini hópin. Sum heild haldi eg eisini, at talan er um eina rúgvu av framúr evnaríkum ungum spælarum í Føroyum, men enn hava hesar kanska ikki sligið til í nóg stóran mun í fremstu røð. Tað kunnu tað so vera fleiri orsøkir til, men tað er týdningarmikið, at vit arbeiða víðari við teimum talentum, sum vit hava.

### Fara eftir gullinum

Og Flemming legði eisini dent á, at hóast talan er um fráveru. Og hóast vit ikki kenna mótstøðuliðini, so er málið greitt.

– Vit fara so ikki avstað fyri at verja silvurmerkini. Vit fara fyri at vinna gull, og so mugu vit síggja, hvussu tann royndin fer at hilnast. Men verður talan um eina kapping á sama støði, sum hon var fyri tveimum árum síðani, so haldi eg avgjørt, at vit eiga at hava ein møguleika til hettal, staðfesti hann.

Flemming mátti tó viðganga, at fyrireikingarnar hjá liðnum kundu verið betri.

– Kappingin endar jú beint undan fráferðini, og tí fáa vit ikki savnað hópin nakað serligt, áðrenn fráferðina. Men tað eru nú einaferð tær fortreytir, sum vit hava at arbeiða eftir, og so mug vit fyrihalda okkum til tað. Í mun til seinasta hava vit so eisini arbeitt miðvíst í tvey ár hesaferð, og tað telur avgjørt rætta vegin í so máta.

# Ein góð gularót

**Her og nú er tað FM-stríðið, sum telur. Men tað er einki at ivast í, at ein slík ferð eisini er ein góð gularót at stremba eftir, heldur Unn Kragesteen**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein av nýggju spælarunum, sum verður við á landsliðsferðini til Bosnia, er Unn Kragesteen úr Neistanum. Grundað á góðu úrslitini, sum liðið fekk fyri tveimum árum síðani, so er spenningurin um ferðina sjálvandi stórur.

– Men tað haldi eg nú eisini, at hann er hjá teimum, sum vóru við fyri tveimum árum síðani. Tær vilja sjálvandi gera tað enn betri, enn silvurmerkini seinast, so sum heild er hetta nakað, sum allar síggja fram til, haldi eg.

Høvdu góðu úrslitini fyri tveimum árum síðani eisini við sær, at áhugin hjá øðrum gjørdist enn størri. Hugsi kanska serliga um tykkum yngru spælarar. Hava vit siktað eftir hesum í tvey ár?

– Hetta hevur sjálvandi verið ein gularót, og eg eri sjálvandi sera fegin um at vera við. Men tað eru nú eisini onnur ting, sum draga. Í Neistanum er tað øllum førum FM-stríðið, sum liggur fremst í huganum í løtuni, og bara tað í sjálvum sær er nóg mikið at stremba eftir. Men hetta er heilt víst ein góð gularót at hava afturat, sigur Unn.

### Strævnir dagar

Við einum spælarahópi á 16 spælarar, verður kanska misjavnt, hvussu nógv spælitíð verður til tær einstøku. Men her og nú tykist hetta tó ikkiv vera nakað, sum Unn hugsar um.

– Verður hugsað um mítt pláss, so verða tað helst Heidi Maria og eg, sum koma at kappast á hesum. Men akkurát tann kappingin er ikki tað, sum eg hugsi mest um. Við eini skrá, sum vónandi fevnir um fimm dystir upp á fimm dagar, verður ríkiligt at síggja til. Og tað sigur seg sjálvt, at eingin spælari kann spæla 60 minuttir hvørja ferð. So eg rokni við, at okkara lutur fyrst og fremst verður at hjálpa og stuðla hvørjari aðrari, heldur enn at kappast móti hvørjari aðrari. Tað týdningarmesta er, at liðið stendur sterkt sum ein eind. Og tað rokni eg við, at allar 16 taka undir við, sigur Unn Kragesteen at enda.

## FAKTA

**Hópurin**

| Spælarar | |
|---|---|
| Tomma Petersen | VÍF |
| Fríða Petersen | Neistin |
| Erla Eliasen | Neistin |
| Simona Hansen | Freja HK |
| Durita Ljósstein | Viborg HK |
| Annika Karlsdóttir | Viborg HK |
| Anna Maria Káradóttir | Ajax HK |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan |
| Una Olsen | Stjørnan |
| Katrin á Neystabø | Neistin |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF |
| Unn Kragesteen | Neistin |
| Ása á Neystabø | Neistin |
| Anja Heinadóttir | Kyndil |
| Annika Thomsen | Neistin |

**Venjarar**
Flemming Raben
Svein Rógvi Nielsen

Leiðarar
Eirikur Magnussen
Niels Petur Bech
Jákup Durhuus
(Hartil verður talan eisini um fysioterapeut)